# London Eye

London Eye var upprunaliga bygt til at markera túsundáraskiftið. Upprunanavnið var the Millennium Wheel, og tað var tá størsta hjólið í heiminum við sínum 135 metrum í diametrum. Ætlanin var, att hjólið bert skuldi standa uppi túsundáraskiftið, men tað vísti seg at gerast so væl umtókt at vera í, at avgjørt varð, at lata tað standa. Útsýnið yvir London er ótrúligt, men skal tú upp í hjólið, skal tú eisini seta tíðina av. Tað tekur ein hálvan tíma at koma runt, og hjóli steðgar als ikki, men koyrir runt alla tíðina. Hjólið varð bygt á pantongum á Thames ánni, og varð síðani reist upp við risakranum til at standa soleiðis, sum tað stendur nú. Hjólið stendur við kendu ánna Thames millum Westminster Bridge og Hungerford Bridge. London Eye er nú eitt av best umtóktu ferðamannamálunum í London yvirhøvur, og tríggjar milliónir fólk vitja í hjólinum um árið.






















